


**Nr. 17** **24. august 2014** **74. árg.**

# Kristus lív mítt

> *Men vit vilja ikki brøður, at tit skulu vera óvitandi viðvíkjandi teimum, sum sovna burtur, fyri at tit ikki skulu syrgja eins og hinir, sum ikki hava vón. Tí at um vit trúgva tí, at Jesus er deyður og risin upp, tá skal Gud eisini somuleiðis við Jesusi leiða tey fram, sum sovnað eru burtur, saman við honum. Troystið tí hvør annan við hesum orðum.*
>
> *1.Tess. 4,13–14 og18*

Her á fold endar lívið við deyðanum, og fólk gráta og syrgja. Men heima í himmalsku dýrdini er deyðin ikki til longur. Alt er gott. Gud turkar tárini burtur, og har er hvørki sorg ella saknur. Um okkara kæru, sum vit hava mist, livdu í trúnni á Jesus, eru tey nú heima hjá Gudi í himmalsku dýrdini. Tað eiga vit at takka fyri og gleðast um.

Í Tessalónika í Grikkalandi varð funnin ein gravsteinur við orðunum: ”Í deyðanum ongin vón!” Hetta vóru troystarleysu orðini við grøvina hjá einum heidningi. Stutt haðani varð eisini funnin ein annar gravsteinur við orðunum: ”Kristus lív mítt!” Her varð ein kristin grivin, sum kendi orðini úr Fyrra Tessalónikubrævi, sum standa her omanfyri.

Eydnurík eru tey, sum kunna siga: ”Kristus er lív mítt!” Um tú hevur mist og saknar, skalt tú við vón og gleði lurta eftir boðskapinum um Frelsaran, sum við deyða sínum og uppreisn hevur vunnið á deyðanum. Um tú hevur so nógv um at vera, at tú ert um at missa himmalska málið úr eygsjón, eigur tú at steðga á. Ein dag mugu vit fara frá øllum tí jarðiska. Tí er umráðandi at liva lívið í trúnni á hann, sum er tann einasti, sum kann bera okkum heim í himmalin.

*So er tað tá vist,*
*eg frið havi funnið í tær, Harri Krist!*
*So tori eg trúgva, at Gud elskar meg,*
*at Jesusar blóð mína synd sónaði.*
*Eg halli meg at tær, eg falli á knæ*
*við Golgata træ!*

# Lovsongurin

*Men Jesus sigur við teir: "Ja, hava tit ongantíð lisið hetta: "Av smábarna og bróstabarna munni hevur tú song tær lagað."*

*Matt. 21,16.*

Tað er eitt orð í Gamla Testamenti, sum Jesusi hevur dámt væl, og sum hann nýtti, tá ið fíggindarnir ilskaðust um lovsong barnanna. Teir ilskast eisini enn um glaða song teirra ungu; men eisini tann songin dámar Jesusi væl.

Syngur tú nógv? Tey ungu plaga ikki at hava so góðan hug at syngja, og kanska er málið ikki ment til fulnar enn. Tá ið tú hevur góða samvitsku, og tað mást tú royna at hava, so kanst tú syngja – tú kanst ikki lata vera at syngja Gudi glaðan song.

Ein góður sangur er ein góður vinur at hava, tá ið tú ert einsamallur. Hann lýsir upp, um tit eru fleiri, og ger tykkum til góðar vinir. Jesus og vinir hansara sungu eisini, áðrenn hann fór út í Getsemane urtagarð.

Vit eiga nógvar góðar sangir og sálmar. Eingin er eydnuríkari enn eitt ungt, kristið menniskja. Syng so av gleði, tú ungdómur!

*O, um eg kundi tær, Jesus, prísa,*
*sum eg so fegin vil av sál og sinn,*
*tí at tú vildi ta náði vísa*
*at bjóða mær í himmiríki inn!*

*O, eydnusæla, nú tín eg eri,*
*takk, Jesus, takk, at eg kann vera við!*
*Hitt góða verkið tú nú fullgeri,*
*Inntil eg komi í títt frelsta lið!*

*t.* týddi.

# Eitt uggandi orð

Kendi gudfrøðingurin Immanuel Kant segði, tá ið hann lá fyri deyðanum: "Í øllum teimum túsundtals bókum, sum eg havi lisið, hevur tó onki uggað meg so nógv sum hetta sálmaørindið:

Gangi eg í dimmum dølum, onki ilt eg óttist. Tí tú ert við mær, tín stavur og tín keppur, teir ugga meg.

# Djørv trúgv

Grethe Kock

Í november var eg á Global Leadership Summit, stytt GLS. Hetta er ein heimsumfatandi leiðararáðstevna, sum kemur úr tí stóru kirkjuni Willow Creek í Chicago. Eftir tveimum døgum høvdu vit hoyrt nógvar fyrilestrar, sum góvu okkum góðan íblástur og evni til umhugsanar.

Ein av talarunum var ein ógvuliga bragdligur 31 ára gamal amerikumaður, sum eitur Steven Furtick. Hann var leiðandi prestur við Elevation Church, sum er ein av teimum kirkjunum í USA, sum veksur skjótast. Har koma 9000 fólk til gudstænastu hvørja viku. Fyri 5 árum síðani flutti hann saman við konuni og 7 øðrum familjum til ein nýggjan bý og stovnaði kirkjuna. Tey byrjaðu heilt á berum botni, men saman høvdu tey eina visjón og eina væntan um, at Gud fór at gera stór ting í hesum býi, har tey búsettu seg. Hóast tey vóru fyri mongum vónbrotum, góvust tey ikki. Steven Furtick greiddi frá, at ofta hava vit lyndi at sammeta okkara gerandisdag við hægstu tindarnar í lívinum hjá øðrum – og tí er so lætt hjá okkum at gerast vónsvikin.

Í 2. Kongabók kap. 3 vers 9-20 profeterar Elisa profetur og sigur, at fólk skulu grava veitir og gryvjur, so tey eru til reiðar, tá ið Gud sendir vatnið. Steven Furtick talaði út frá hesum teksti. Hann segði, at hóast alt sær vónleyst út í eygum okkara, so skulu vit ikki falla í fátt, men halda fast í okkara visjón og trúgva og virka við dirvi og áræði. Vit skulu í fluttari merking ”grava veitir”, so vit eru til reiðar, tá ið Gud fer til verka, og minnast, at tað er bara Gud, ”sum fær tað at regna”.

Á ráðstevnuni segði Steven Furtick m.a.: ”At hava góð hugskot ger teg ikki framskygdan, tað ger teg bara til ein dagdroymara. Munurin millum eina visjón og ein dagdreym er dirvið at virka og trúgvin at byrja.”

So víga at trúgva, at Gud kann gera tað ómøguliga!

*LMF-blaðið.*
*Effie Campbell* umsetti.

---

Ein plakat hekk á vegginum á skrivstovuni hjá pápa. Har stóð: “Eg grenjaði, av tí at eg hevði ongar skógvar - líka til eg møtti einum manni, sum ongar føtur hevði.” Hygg at tí, tú hevur - ikki at tí, tú ikki hevur!

*e.c.* ums.

# At drekka signingar

Betty From Jensen

Á fløskuni við drekkivatni, sum eg beint nú havi keypt, stendur ”baraka”. Tað er eitt arabiskt orð, sum merkir ”signing”.

Tey fýra árini, eg búði í Cairo, var tað ein frálík heilsan at fáa tær nógvu ferðirnar, vit noyddust at keypa drekkivatn í fløskum. Tað var lívsneyðugt við vatni – tað merktu vit serliga í tí heita veðurlagnum í Egyptalandi. Eina sovorðna fløsku við einum ½ ella einum heilum lituri av vatni drakst tú skjótt! Og so drakst tú enntá ”signing”!

At drekka signing – tað er at liva við Harrans signing og at hava hana við á ferðini gjøgnum tilveruna sum nakað lívsneyðugt. Tað er tað, sum Gud bjóðar okkum í hvørji gudstænastu, har signingin ljóðar niður yvir okkum.

Tann aronitiska signingin fatar um okkara ynski bæði fyri nútíð og framtíð. Signingin hoyrir saman við Guds andliti – at hann letur tað ”lýsa yvir teg” og ”lyftir upp ásjón (t.e. andlit) sína yvir teg”. Tað er ein mynd upp á høvdingan, sum situr við bendum høvdi og lurtar, tá ið hin fremmandi sleppur at stíga fram fyri hann við ynskjum sínum.

Aronitiska signingin er í trimum liðum og ber fram ynski um at verða varðveittur frá øllum óndum, um Guds náði og um Guds frið.

Signingin fatar um

- viðurkenning: at geva onkrum signing sína er ein viðurkenning, hóast tað sum er hent

- styrki: signing Guds er ein serlig kraft ella styrki, ein kelda, sum vellir fram úr Kristusi

- fylgi: signingin er lyfti um Guds nærveru uttan mun til, hvat ið hendir, og ein livandi vón, sum fylgir okkum nú og allar dagar.

Harrin vælsigni teg og varðveiti teg!

Harrin lati andlit sítt lýsa yvir teg og veri tær náðigur!

Harrin lyfti upp ásjón sína yvir teg og gevi tær frið! 4. Mós. 6,23-26.

Mátti tað verði so, at vit eisini framyvir drekka signing!

*Effie Campbell* umsetti.

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta,  35 77 74